# Handan leiktjøldini við landsliðnum

Nýggja bókin um føroyska fótbóltslandsliðið hjá Súna Merkistein er í veruleikanum nógv meira enn ein vanlig fótbóltsbók. Hon er bæði víttfevnandi og eksperimenterandi, men samstundis beinreikin, og sum heild undirhaldandi lesnaður



*Rithøvundurin at bókini, Súni Merkistein, heldur alla tíðina fast um serstaka frásøguháttin, og hetta ger, at lesarin hevur nógv lættari við at liva seg inn í bókina*

UMMÆLI

*Jákup Mørk*

At geva fótbóltsbøkur út, er als ikki nakað nýtt fyribrigdi her heima. Tvørtur ímóti hevur tað nú í 10 ár verið fastur táttur, at árbók er komin um landskappingina, eins og bók um altjóða tilveruna hjá A-landsliði okkara hevur verið útgivin.

Hvat er so tað, sum ger, at útgávan hjá Súna Merkistein »Føroyar í HM-fótbólti« hevur uppiborið eitt serstakt ummæli?

Svarið er einfalt. Bókin, sum ber undirheitið »Undankappingin 2000/2001« snýr seg sjálvandi um fótbólt, men har umframt snýr hon seg eisini um so øgiliga nógv annað av tí, sum fyriferst kring landsliðið.

Har aðrar bøkur av sínum slag hava sum aðalmál at draga samanum, og lýsa teir dystir, sum landsliðið hevur leikt, so er hetta mest sum minsti parturin av bókini, og tað er so í øllum førum nakað nýtt.

PERMAN MISPRÝÐIR

Hóast hesi vøkru orð, so er tó eitt, sum misprýðir bókina, og tað er perman. Tað er stórt spell, at ein bók av slíkum slag, ikki er at fáa við stívari permu.

Helst er tað óttin fyri, at bókin hevði verið ov dýr, sum hevur gjørt, at hetta er frávalt, men spurningurin er, um tað so ikki hevði verið betri at spart upp á onkrar av vøkru litmyndunum.

Tær eru eisini nógvar í tali. Myndirnar. Men tær verða ongan tíð tað berandi elementið í slíkari útgávu. Tað er perman kanska heldur ikki, men ein bók av slíkum slag eigur snøgt sagt at síggja út av meira enn einari »paperback-útgávu«.

VÆL SKRIVAÐ

Verður kortini farið inn í bókina, so er eisini skjótt greitt, at innihaldinum bilar einki. Ein sveimandi, hugleiðandi, afturlítandi og ikki minst vælskrivaðum fyrsti kapitul er allur sum hann er halgaður til eitt bóltspark. Tað hjá Øssuri Hansen, tá hann tryggjaði Føroyum javnleikin móti Slovenia, sum helst var største bragdið í hesari undankappingini.

Hetta slagið av skriving, sum Súni Merkistein her avdúkar, minnir ikki sørt um navnframa danan, Per Høyer Hansen, sum í mong ár varð mettur at vera fremsti danski ítróttarblaðmaðurin. Ivaleyst hevur tað eisini verið við dananum í huganum, at fyrsti parturin er skrivaður, og skal rætt vera rætt, so er hendan royndin hjá Súna sera væleydnað.

Eisini seinasti parturin í bókini, har endin av føroyska tíðarskeiðinum hjá Allani Simonsen verður umrøddur, ber brá av líknandi skrivingarlagi, og tann parturin fellir eins væl í eyguni, sum hin fyrsti.

FRÁSAGNIRNAR

Tað eru hinir 13 partarnir í bókini eisini. Sum nevnt omanfyri, so snýr bókin seg um so nógv annað enn bara spælið við bóltinum, og tað er ein frægd at liva seg inn í, hvussu alt vásið kring ymsu dystirnar hevur lagað seg. Ikki minst á ferðunum til Russlands og Jugoslavia, har fleiri meira ella minni skemtiligar – fyri ikki at siga klombrutar – søgur eru á skránni.

Í hesum viðfangi skal eisini verða nevnt, at konsekventi frásøguhátturin í bókini so avgjørt stimbrar uppundir, at lesarin fær innlivað seg í støðurnar. Skrivað verður alla tíðina í nútíð og fyrstapersóni, tá greitt verður frá hendingum, sum hava tikið seg upp, og stuttligt er at síggja, hvussu nógvir smálutir eru við í frásagnunum, sum til dømis í hesum brotinum av russlandsferðini.

»Trý fólk eru á skrivstovuni, tveir tilkomnir men og eitt yngri konufólk. Ivan skiftir orð við annan av monnunum, hann er heldur førur og jótrar seigliga okkurt tyggigummi í munninum. Okkum vendir hann sær ikki til, er helst ikki stívur í enskum, og tí fer alt samskiftið um Ivan.«

Soleiðis er alla tíðina, tá hendingar verða lýstar, meðan talan er um ein meira afturlítandi frásøguhátt, tá tikið verður samanum, ella greiðast skal nærri frá onkrum.

Kanska eitt sindur serstakt við slíkari nýtslu av frásøguhátti, men aftur ein roynd, sum høvundurin sleppur væl frá.

BEINRAKIN

Á baksíðuni á bókini verður millum annað sagt um bókina, at hurðin til landsliðið verður gloppað innanífrá, og at ljós verður varpað á tað, sum fer fram handan leiktjøldini.

Kanska stór orð, men helst er tað júst hesin parturin av bókini, sum er tann mest áhugaverdi. Súni Merkistein bæði dugir og ikki minst torir at vera beinrakin, tá hendingar kring liðið verða umrøddar.

Avboð og væntandi úttøkur verða lagdar undir sjóneyku, eins og fráveran hjá Toda Jónsson fær sína serstaka viðgerð, og hjá teimum, sum annars hava fylgt væl við landsliðnum, kann meira enn so vera, at okkurt nýtt er at lesa í hesum. Ikki minst tí høvundurin hevur havt dirvi til at skera inn á bein.

Kanska vil onkur vera við, at skurðurin er somikið djúpur, at hann viðhvørt stígur inn um markið millum tað fakliga og persónliga, men bókin er somikið stóran mun merkt av persónligum upplivingum, at tað valla fær verið øðrvísi. Og í øllum førum er stigið ongan tíð somikið stórt, at høvundurin ikki fær staðið inni fyri tí, sum skrivað er.

TRÝ Í EINUM

Samanumtikið er bókin mest sum eitt fullkomið yvirlit yvir tann partin av føroyskari fótbóltssøgu, sum eitur HM-undankappingin 2000/2001. Spektrið í bókini er tó somikið breitt, at hon væl kann lesast av øðrum enn fótbóltsfólki, tó at reyði tráðurin í bókini sjálvandi snýr seg um fótbólt.

Vandin í slíkari bók er sjálvandi, at høvundurin mest sum setir seg millum tveir stólar. Øðrumegin skal talan vera um eina fótbóltsbók – ætlað fótbóltsfólki – meðan hon samstundis skal vera álík eini skaldsøgu.

Tað er ofta, at slíkt eksperiment miseydnast, men hesa ferð er Súni Merkistein sloppin óvanliga væl frá uppgávuni. Somikið væl, at talan nærum er um tríggjar bøkur í einum.

Kanska er hon fyrst og fremst ein fótbóltsbók um landsliðið við stuttum dystarfrásagnum og neyðugu hagtølunum.

Harafturat er tó eisini talan um eina skaldsøgu. Ein søga um undankappingina 2000/2001 við øllum tí, sum hartil hoyrir. Uttanlandsferðir, fremmand mentan, klandur av ymsum slag og bæði halló og farvæl til meira ella minni almennar persónar.

Í triðja lagi er bókin eisini nakað annað. Eitt stuttsøgusavn. Tí hóast partarnir í bókini sjálvandi eru framhald av hvørjum øðrum, so eru teir somikið sjálvstøðugir, at tað saktans ber til at lesa teir einsæris.




*Sum heitið sigur, so snýr nýggja landsliðsbókin seg um fótbólt, men harafturat snýr hon seg eisini um so øgiliga nógv annað*





*Villads Bøgesvang*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Eitt brennandi ynski

Ætlar tú at verða tyrluflogskipari, skalt tú veruliga hava eitt brennandi ynski um at røkka málinum. Útbúgvingin er alt ov kostnaðarmikil og strævin fyri at gevast á hálvari leið

FLOGSØGA

*Kaj Joensen*

Tað man vera mangur smádrongur, sum hevur havt eitt ynski um at blíva flogskipari. Soleiðis var tað eisini fyri teir báðar flogskipararnar, Terja Jacobsen og Villads Bøgesvang, sum báðir hava droymt at blíva flogskipari frá barnsbeini av. Men tað skal meira enn bara ein barnadreymur til. Tað krevur veruliga, at tú hevur eitt brennandi ynski um at røkka málinum, tí útbúgving er strævin og kostnaðarmikil. Men barnadreymurin er gingin út fyri teir báðar flogskipararnar.

HENDAN DAGIN vit eru við tyrluni, er nógv ferðafólk við norðureftir. Øll skulu tey til útoyggjarnar, Fugloy og Svínoy. Tyrlan er stúgvandi full av fólki, og ein kemur at hugsa, um ikki hetta er eitt stressandi tíðarskeið hjá flogskiparunum nú tað stundar til jólar. Men soleiðis er ikki.

- Tað er eitt sindur fleiri ferðafólk við nú til jólar enn vanligt, men hetta er lágárstíð viðvíkjandi tyrluflúgving. Tað eru nógv fleiri ferðafólk um summarið, sigur Terji Jacobsen.

Men tað er eitt sindur meira av farmi at flyta, nú Súlan ikki siglur út til Mykinesar, leggur Terji aftrat.

Um summarið kemur tað ofta fyri, at teir verða noyddir at gera eykatúrar. Men nú hesa tíðina plaga teir at kunna nøkta tørvin við verðandi ferðaætlan, sum umfatar tríggjar dagar um vikuna. Men farmurin er heilt ein annar nú tað nærkast jólum. Eftir at hava flogið krov og annað í samband við, at heystfjøllini eru gingin, er farmurin broyttur til jólapakkar og annað, sum kann setast í samband við jólini. Eisini ferðafólkini eru øðrvísi nú, fólkini eru fínari nú enn vanligt og hýrurin er betri enn vanligt á fólki.

AT TAÐ KREVUR sín mann at verða flogskipari, er lítið at ivast í, og báðir flenna játtandi, tá ið teir verða spurdir um ein krevur at vera av einum serligum slagið fyri at kunna gerast tyrluflogskipari. Ja, ein má vera ørur bara at fara undir eina tílíka útbúgving, halda teir við. Fyri tað fyrsta er útbúgvingin sera kostnaðarmikil, og ein má sjálvur gjalda fyri útbúgvingina. Bara hetta man fáa tey flestu at falla frá longu nú, umframt at útbúgvingin er torfør at koma ígjøgnum, sjálvt um hon “bara tekur 2 ár”.

Eisini mugu tyrluflogskipararnir hjá Atlantic Airways eftirútbúgva seg allatíðina, sum teir sjálvir kalla fyri heimsins bestu eftirútbúgving. Teir meta nevniliga, at onga aðrastaðni í heiminum verða tyrluflogskiparar hildnir so væl “up to date” sum her í Føroyum.

Sjálvt arbeiði er eisini slítandi. Umframt at flúgva ferðafólk, eru eisini aðrar uppgávir. Tað kunnu vera uppgávur, har tyrlan verður leigað til at flyta eitthvørt út á tær smáu oyggjarnar, men tað sum er mest slítandi er uttan iva sjúkraflutningurin. Har kunnu verða løtur sum ikki altíð eru so tespiligar. Men tíbetur kunnu løtur sum at flúgva í so góðum veðri sum hendan dagin, vit vóru við, javnviga við tær minni góðu løturnar.

- Ein sær annaðleiðis uppá á lívið eftir at hava upplivað løtur tá ið tað hevur leikað hart á, eru teir báðir samdir um.

- Eisini krevur tað nógv og gott tol og ikki minst góðan stuðul frá familjuni, tí tað munnu verða fáir sjómenn sum eru so lítið heima við hús sum vit eru, siga teir.

TEIR FÝRA tyrluflogskipararnir, sum eru knýttir at tyrludeildini, ganga á vakt tríggjar dagar og hava síðan tríggjar dagar frí. Á vaktini búgva teir í Sørvági, har Atlantsflog leigar eitt hús til teir. Tað krevst, at teir eru tøkir alt samdøgnið og eru búgvandi so nær við tyrlupallin sum møguligt, fyri at kunna rykkja út so skjótt sum gjørligt, um tað er neyðugt.

Uppgávubýtið er greitt, tá ið teir ganga á vakt. Teir dagar tá ið flogið verður eftir ferðaætlani er tað uppgávan hjá stýrimanninum at kanna, hvussu veðrið er og ferðafólkalistan, meðan skiparin kannar tyrluna eftir at mekanikarnir hava hugt eftir henni.

Terji sigur, at teir fylgja gjølla við veðrinum gjøgnum dagin. Stýrimaðurin hevur altíð samband við plássini, har teir skulu til, áðrenn farið verður, fyri at tryggja, at líkindini eru í lagi.

- Tað skal helst verða so behagiligt hjá ferðafólkunum sum møguligt, men sjálvt um tað eru fáir dagar, har tað ikki verður flogið, so leggja vit ikki nógv fyri. Tað eru greiðar reglar fyri, hvussu líkindi skulu verða fyri at kunna flúgva. Til dømis verður ikki flogið ferðafólkaflúgving í mjørka, greiðir Terji frá.

Annars eru uppgávurnar ójavnar teir dagar, tá tað ikki verður flogið eftir ferðaætlani. Tað eru nógv sum munnu hava notið væl av tyrluni, sum eitt sera hent amboð, tá ið okkurt skal flytast niðan í fjøllini ella til aðrar líknandi uppgávur.

Venjingar eru eisini ein fastur partur í arbeiðsgongdini hjá tyrluflogskiparanum. Tað kann verða venjing í náttarflúgving so væl sum um dagin. Terji leggur áherðslu á, at teir arbeiða væl saman, bæði flogskipararnir og hini starvsfólkini á tyrludeildini. Hann samanber teir við eitthvørt ítróttarlið. Meir teir venja, betri blíva teir.

BÆÐI TERJI og Villads skulu hava vakt á jólum, so jólini verða hildin vesturi í Vágum í ár. Tað er kanska óhugaligt at hugsa sær at arbeiða á jólum, og teir kunnu skjótt fáa ein leiklut, har teir skulu hjálpa øðrum á jólum. Terji minnist serliga eina hending fyri nøkrum árum síðani. Familjan, sum búði úti í Stóru Dímun, slapp ikki út vegna veður.

- Vit høvdu roynt í tveir dagar, men einki bar til, men so triðja dagin, sjálvan jólaaftan bar endiliga til, og familjan kundi verða heima og halda jól. Tað var nakað serligt at kunna fáa tey heim til jólar, tí eg haldi, at øll vilja sleppa at halda jól heima hjá sær sjálvum, sigur Terji.